



# Eingin døgurði til pensionistarnar

**Stýrið fyri Lágargarð hevði fund seinnapartin týsdagin at viðgerða støðuna, nú stuðulin frá Almannastovuni í ár er skerdur við 44 prosentum. Niðurstøðan hjá stýrinum var tann, at frá komandi mikudegi at rokna steðgar útkoyringin av døgurða til okkurt um 150 pensionistar í Havn, og harafturat steðgar dagstovnavirksemi á Lágargarði eisini sama dag.**

SPARINGAR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Komandi mikudag sleppa einir 60 pensionistar ikki longur at gera gagn av dagstovnatilboðnum á Lágargarði ella fáa fysioterapiella aðra viðgerð á stovninum. Somuleiðis steðgar døgurðaútkoyringin til umleið 150 pensionistar í Havn komandi mikudag.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er komið ógvuliga dátt við hjá øllum teimum stovnum, ið fáa stuðul frá Almannastovuni til umsorganararbeiði, at hesin stuðul, nú árið er nærum hálvrunnið, er skerdur við 44 prosentum. Ronald Poulsen, formaður í stýrinum fyri Lágargarð í Havn, sigur, at nú boðini ujm skerjingarnar eru komin so mikið seint, er játtanin at kalla brúkt. Tí avgjørdi stýrið á fundinum týsdagin, at mikudagin 6. juli steðgar øll útkoyring av mati til umleið 150 pensionistar í Havn, og somuleiðis verður steðga við dagstovnatilboðnum á Lágargarði, sum einir hálvthundrað pensionistar dagliga nýta.

KAMPANJUAVSLÁTTUR
UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR
BILAR

## Ræðuligt at hugsa sær

Ronald Poulsen sigur, at tað er ræðuligt at hugsa sær, at hesir 150 pensionistarnir frá komandi mikudegi ikki longur fáa døgurða koyrdan til dyrnar, men Lágargarður hevur ikki møguleika fyri at spýta eyka pening í til útkoyringina, tí stovnurin er so mikið hart spentur fíggjarliga frammanundan.

- Eg haldi tað verða ræðuligt, tí hvar skulu hesi 150 fólkini nú fáa sín døgurða frá. Tað er ikki vist, at tey øll hava onkran kæran, ið kann koma við døgurða til teirra. Eg vildi ynskt, at vit høvdu møguleika til at gera okkurt við hetta, men tað ber ikki til, sigur Ronald Poulsen.

Ronald Poulsen sigur seg vóna, at ein broyting kemur í, soleiðis at tað fer at bera til at halda fram við vanliga virkseminum, men um so er tað landið, ið má traðka til, sigur hann.

Í blaðnum í gjár segði Ronald Poulsen, at hann umhugsaði støðu sína í stýrinum, men hann sigur nú, at hann ikki fer frá, tí hann vil verða við til at halda skútuni flótandi, meðan tað leikar í, sum hann málber seg.




## KT-fólk til Atlantic Airways

Vit sóknast eftir einum kt-fólki við innliti og yvirliti. Høvuðsuppgávurnar fevna um at menna skipanir, at standa fyri netumsiting og at veita brúkarum hjálp.

Talan er um nógvar ymiskar skipanir við fleiri ymiskum uppgávum, og tí krevst breiður og neyvur kunnleiki til tólbúnað, net og forrit. Talan er um einar 60 brúkarar.

Tú hevur viðkomandi útbúgving ella góðar royndir, ið fevna um forritan, datugrunnar og netumsiting. Harafturat leggja vit dent á, at tú dugir at leggja títt arbeiði skilagott til rættis og hevur góð samstarsevni.

Tú ert røkin, arbeiðir sjálvstøðugt og ert til reiðar at taka eina hond í, tá ið á stendur. Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Arbeiðsumhvørvið er sera gott, og møguleikarnir at menna seg bæði fakliga og persónliga eru góðir.

Starvið verður sett skjótast til ber eftir sáttmála við Atlantic Airways. Umsókn merkt »kt-fólk« kann sendast til Atlantic Airways, FO-380 Sørvági, og skal vera okkum í hendi seinast 11. juli kl. 12.00.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com
www.sansir.fo